gult38 cyan38 magenta38 svart38


















gult39 cyan39 magenta39 svart39



**FILMSTEIGURIN**

# The Wedding Planner

Eingin kennir kærleikans vegir betur enn Mary Fiore. Tað er ikki uttan orsøk, at hon er ein av teimum bestu brúdleypsfyriskiparunum í San Fransisco, og hon fæst dagliga við at geva kundum sínum ógloymandi og romantiskar dagar.

Men hennara væleydnaða yrkisleið hevur eisini kostað henni nakað, tí hon hevur sjálv ongantíð funnið kærleikan.

Meðan Mary gleðir seg um at hava gjørt eina avtalu við ein stóran kunda, sum er internet millióningurin Fran Donnoly, verður Mary rakt av eini ruskbingju og sleppur so dánt við lívinum.

Bjargingarmaður hennara í tí førinum er tann snøggi og vakri Dr. Steve Edison, og tey bæði eru saman restina av tí degnum.

Mary missir heilt fótafestið eftir at hava møtt Steve, tí hon hevði mist alla vón um at møta einum fittum manni, sum ikki var giftur, bøssi ella upptikin á annan hátt. Knappliga er tilveran ljósari. Tó ikki.

Tað, sum at byrja við tóktist ov gott at vera satt, er eisini so. Hennara dreymar og vónir bresta, tá hon varnast, at Steve í veruleikanum er komandi maðurin hjá Fran Donnoly – og tað er hon, ið skal skipa fyri brúdleypinum.

Tá Mary heldur, at lívið er heilt vónleyst, verður tað brádliga enn verri. Faðir hennara er bangin um, at Mary ikki hevur nakran mann, og hann skipar fyri, at hon skal møta Massimo Lanzetta, sum er ungur, sterkur, vakur og er júst komin av Sicilia.

Sannleikans løta er komin, tí nú skal hon velja ímillum kærleika ella kaos. Nú er tað hennara hjarta, sum talan er um.

Jennifer Lopez og Matthew McConaughey hava høvuðsleiklutirnar í einum av teimum stóru romantisku filmunum í ár.




# Finding Forester

Hann var ein spennandi persónur, sum skrivaði eina skaldsøgu, ið vann Pulitzer virðislønina fyri fjøruti árum síðani. Síðani hevur heimurin ikki hoyrt meira um William Forrester. Ikki fyrr enn Jamal Wallace, ein dugnaligur 16 ára gamal rithøvundur, brýtur múrin inn í lívið hjá Forrester og vekir dreymar hansara nú hann er í sínum lívsvetri.

Tann gráhærdi Forrester er tann loyndarfulli maðurin í grannalagnum. Eitt nýtt lív byrjar fyri tann afroamerikanska skúlanæmingin, sum júst er sloppin inn á ein av teimum góðu skúlunum, og fyri Forrester, tá Jamal sníkir seg inn í hús hansara og gloymir ryggsekkin við nógvum av hansara skrivaða tilfari.

Jamal fær soleiðis ein av sínum størstu viðhaldsmonnum, men eisini ein lærara, sum gevur honum avbjóðingar og mennir hann sum rithøvund. Og Forrester hevur endiliga fingið eina orsøk til at




leggja seg útí aftur tað vanliga lívið.

Í íbúðini hjá Forrester, har nógvar gamlar bøkur liggja, møtast teir báðir rithøvundarnir til gamans og álvara.

Vinarlag teirra skal standa sína roynd, tá lærarin hjá Jamal í skúlanum leggur hann undir at taka tilfar frá øðrum í sínum søgum. Jamal má velja millum at gera sínar dreymar til veruleika og at svíkja sín góða vin.




**Frumsýning**

Fríggjadagin 11.05. kl. $18^{45}$
Leygardagin 12.05. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 13.05. kl. $22^{00}$

Fríggjadagin 11.05. kl. $23^{15}$
Leygardagin 12.05. kl. $23^{15}$

**www.in.fo/havnarbio**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 3119 56




**Frumsýning**

Fríggjadagin 11.05. kl. $20^{45}$
Leygardagin 12.05. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 13.05. kl. $20^{00}$




Fríggjadagin 11.05. kl. $21^{00}$
Leygardagin 12.05. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 13.05. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 11.05. kl. $23^{30}$
Leygardagin 12.05. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 13.05. kl. $22^{45}$




Fríggjadagin 11.05. kl. $18^{30}$
Leygardagin 12.05. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 13.05. kl. $17^{45}$